# rið í øktum effektiviteti





*Gilli Trónd, býarfrøðingur og geografur, helt áhugaverdan fyrilestur á valfundi í Runavík mánakvøldið*

*Mynd: Benjamin Rasmussen*

verið brúktur til høvuðsveg millum Tórshavn og Klaksvík – við tunli millum Skálafjørð og Kambsdal, undirsjóvartunnil í Sandoynna, altjóða flogvøll, stovningarfæ til eitt burðardygt universitet á altjóða støði – og til aðrar útbyggingar av føroyska samfelagnum.

- Ein slík peninganøgd røkkur langt, legði hann aftrat.

## Árin og ávirkan

Gilli nam eisini við spurningin um umhvørvisárin av Skálafjarðartunlinum.

- Tunnilin tekur ikki nógv lendi, og tí eru árinini ikki tey heilt stóru. Hinvegin er nyttan stór við tað, at bilaferðslan annars minkar við 50 miljónum kilometrum um árið – um sami vøkstur annars hevði verið í ferðsluni uttan tunnil.

Hann helt tað vera sannlíkt, at samlaða ferðslan fer at økjast enn meira við bøttu atkomuligheitini, og soleiðis verður eisini búskaparliga nyttan av verkætlanini enn størri.

- Tað er altíð torført at spáa um framtíðina, men kortini fari eg at gera nakrar metingar.

Gilli segði, at handilsvinnan – í fyrsta lagi í Tórshavn – fær ágóðan og ávøksturin, tá ið undirsjóvartunnilin verður veruleiki. Innan ídnaðarvinnuna verður tað í fyrsta umfari Skálafjørðurin, sum fær ágóðan.

- Hetta er útgangsstøðið í staðsetingarhøpinum, men hesi viðurskifti kunnu broytast, eitt nú við kommunalum átøkum og vinnufúsum borgarum, legði hann aftrat.

## Sethúsaprísir

Ein onnur broyting verður, at sethúsaprísirnir við Skálafjørðin fara at veksa við umleið 25% í miðal, og sannlíkt er, at prísirnir um hesar leiðir koma á umleið sama støði sum prísirnir í Kollafirði og á Velbastað.

- Størsti vøksturin í prísunum verður á vestara armi á Skálafjørðinum, sum í dag eru í eini lægri príslegu enn prísirnir á eystara armi, segði Gilli Trónd í sínum fyrilestri.